# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Elsa Maria Sigurðsson seksti ár



Í dag, leygardagin 22. oktober, fyllir Elsa Maria Sigurðsson í Klaksvík 60 ár. Elsa Maria varð fødd í Árnafirði og er bóndadóttir. Foreldur hennara vóru Sofía og Erhard Mikkelsen.

Í 1970 giftist Elsa Maria við Torleif Sigurðsson, fyrrverandi formaður í FSF og reiðari í Klaksvík og tey búgva við Stangaskákið í Klaksvík. Elsa Maria og Torleif fingu fýra børn: Steindor í 1969, sum lat lív í ferðsluvanlukku í 1990. Sofía fødd í 1971, sum er gift við Jóhannes. Tey eiga trý børn, Jákup, Elsa Maria og Torleif. Margretha í 1972, sum er gift við Eyðstein. Tey eiga tvey børn, Steintóra og Rói. Og Erna í 1978, sum livir saman við Magna. Tey eiga somuleiðis tvey børn, Bjørt og eina lítla diddu, sum ikki hevur fingið navn enn.

Elsa Maria gekk heima í mong ár og passaði heim og børn. Meðan hon gekk heima, vaskaði hon handilshølini hjá Føroya Keypssamtøku í Nólsoyar Pálsgøtu, og tað ger hon framvegis. Eitt starv, sum hon hevur røkt í yvir tríati ár. Hon arbeiðir eisini hálva tíð á Norðoya Heimavirki á Biskopstø í Klaksvík.

Elsa Maria er burturstødd á føðingardegnum, men vit vilja ynskja henni hjartaliga til lukku við stóra degnum og takka fyri alla hjálp og alt tað, hon gevur.

**Heilsan børnini, svigerbørn og ommubørn**



Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**
Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í sambandi við minningarorð.

Sosialurin
"Nøvn í vikuni"
Tel.341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo

## Jana H. Dalsgaard 50 ár



Mánadagin, hin 24. oktober, verður Jana H. Dalsgaard 50 ár. Jana er dóttir Fríðbjørg og Andreas Højgaard í Rituvík. Hon er gift við Egili Dalsgaard, sonur Sigrun og Viggo Dalsgaard í Skálavík. Tey eiga synirnar Hall og Andreas.

Jana er næstelst av 8 systkjum, har pápin meginpartin av barnaárunum sigldi úti. Tí kom hon sum elsta systir tíðliga at kenna til, hvat tað merkir at hjálpa til í einum húsarhaldi á bygd. Hon fór altíð stillisliga um; men har Jana var, visti tú, at har var góð manning: inni til tað húsliga, úti til hoygging, velting og annað uttandura arbeiði. Jana hevur altíð verið eitt álitisfólk, har hon var stødd - dúglig og arbeiðssom. Hon tók realskúlaprógv á Glyvrum í 1972, studentsprógv í Hoydølum í 1976. Var síðan vikarur í Eysturskúlanum í eitt ár. Haðani gekk leiðin í 1977 á Sjúkrasystraskúla Føroya, har hon leyk prógv í 1981. Innan hetta yrki hevur Jana - eins og so mangar aðrar føroyskar sjúkrasystrar - tikið mangt ódnartakið. Hon starvaðist á Landssjúkrahúsinum í mong ár og var álitiskvinna í eitt longri tíðarskeið. Arbeiddi eisini í eitt áramál í viðtaluni hjá Petur Højgaard, kommunulækna í Tórshavn. Jana las løgfrøði við Århus Universitet í eitt ár og hevur eisini lisið løgfrøði við fjarlestri.

Hon varð vald inn í nevndina í Felagnum hjá Føroyskum Sjúkrarøktarfrøðingum, har hon hevur tikið við 2. skeiði sum formaður í felagnum. Her hevur hon fingið brúk fyri øllum sínum góðu eginleikum: sinnilig og skilagóð, hugsar seg væl um, áðrenn hon handlar. Tá ið so handlast skal, hendir tað við fastari hond og stórari viljastyrki. Hetta gerst í hesum døgum alt meira neyðugt fyri fakfelagið, tí t.d. hetta árið hevur sýnt, at har leggjast bæði gribbar og sjakalar á sjúkrarøktarfrøðingarnar, tá ið ein kjansur er. Jana hevur - saman við nevndini - klára væl at vart borg, tá ið harðast hevur leikað á. Týdningarmesta samráðingarúrslitið hjá Janu er ivaleyst, at komandi føroyska sjúkrarøktingarfrøðinga-útbúgvingin er viðurkend at hava bachelorstig. Eitt úrslit, ið kemur at lyfta ein stóran part av føroysku útbúgvingarskipani eitt sera týðandi stig fram á leiðini at fáa hægri fakligan førleika inn í alt samfelagið. Vit eru tí mong, ið ynskja Janu eitt stórt tillukku á komandi ST-degnum, hin 24. oktober.

**Dánjal Petur**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu,
tá elskaði sonur, bróðir, svágur,
mammu- og pápabeiggi okkara

**Páll Thomsen**
**Strendur**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri góð og troystarrík orð í kapellinum
og í kirkjuni.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og gravarar.
Tøkk til tykkum øll, sum bakaðu og tykkum,
sum hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir
og uppringingar.
Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Hansina**

## Dagurin

**22. oktober. Cordula**. Hon var ein av teimum 11.000 moyggjunum, sum eru umtalaðar 21. oktober

**23. oktober. Severinus**, deyður umleið ár 400. Biskupur í Køln. Í Danmark er hann komin í bland við tann halga mannin Søren úr Ry í Jútlandi.

Latínskt navn, ið merkir tann *strangi* ella *álvarsami*.

**24. oktober. Prokles**. Deyður ár 443. Var næmingur hjá Chrysostomosi, og endaði sum biskupur í Konstantinopel. Nógvar av prædikum hansara eru varðveittar.

Sameindu tjóðir samtyktu skipan sína í mai-juni 1945, og henda dag høvdu so nógv lond góðkent skipanina, at hon kom í gildi. Dagurin verður tí hildin sum ST-dagur.

## Tøkk

Eina hjartans tøkk verður veitt øllum sum sýndu
samkenslu og hjálpsemi, tá ið kæra móðir,
vermóðir, omma og langomma okkara

**Anna Stenberg**
**Sandvík**

doyði og varð jarðað.

Ein serstøk tøkk til heimahjálpina, Suðuroyar Ellis- og Røktarheim og til Jónsvein Beck, prest, fyri góð og troystarrík orð.

*Fyri tey avvarðandi*
**Tórálvur, Emmy, Asbjørn og Annbjørg**

## Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**